Álit

í

løgtingsmáli nr. 63/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn (Sambýlið á Mýrini í Hoyvík)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 8. desember 2020 og eftir 1. viðgerð 15. desember 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 12. januar 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, og landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, saman við Almannaverkinum og Landsverki.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við lógaruppskotinum er at veita heimild til at útvega ein vardan bústað í Tórshavn til fólk við menningartarni. Lógaruppskotið hevur við sær, at bústaðakarmarnir í Tórshavn til fólk við menningartarni gerast betri og meira tíðarhóskandi. Lógaruppskotið fevnir um at byggja eitt sambýli í Hoyvík til 18 fólk.

Í 2018 samtykti Løgtingið at heimila landsstýrismanninum at byggja tveir vardar bústaðir í Tórshavn til fólk við menningartarni fyri í mesta lagi 58 mió. kr.

Tá lógaruppskotið varð samtykt, var bara byggiskráin gjørd, og farið var ikki undir sjálva byggifyrireikingina (prosjekteringina). Í sambandi við byggifyrireikingina av fyrra bústaðnum, sum skal byggjast á Mýrini í Hoyvík, er vorðið greitt, at metti byggikostnaðurin í lógaruppskotinum var ov lágur, og at tað ikki er gjørligt at byggja báðar bústaðirnar innan fíggjarkarmin á 58 mió. kr.

Ætlanin um at byggja seinna bústaðin er ikki slept, men farið er ikki undir at fyrireika byggiverkætlanina, og kostnaðurin er óvissur. Tí ber ikki til í løtuni at gera eina haldgóða meting av, hvat samlaði kostnaðurin av at byggja bæði sambýlini fer at verða.

Ásannandi støðuna, sum hevur verið seinastu tíðina í sambandi við almennu byggiverkætlanirnar og viðmerkingarnar frá Løgtingsins Fíggjarnevnd um, at tað er umráðandi, at verkætlanirnar eru so væl fyrireikaðar sum gjørligt, áðrenn tær verða lagdar fyri Løgtingið, hevur landsstýrismaðurin mett tað at vera rættast at broyta lógina frá at byggja tveir vardar bústaðir til fyrst at byggja ein vardan bústað.

Fíggjarmálaráðið og Landsverk mæla til, at lógaruppskot verða løgd fyri Løgtingið, tá verkætlanaruppskotið er liðugt. Tá verður mett, at neyvleikin í kostnaðarmetingini er størri. Tað er gjørt í hesum førinum.

Við hesum uppskotinum fáa fólk við menningartarni hóskandi karmar um privatlív og felagslív, umframt at karmarnir styðja undir, at borgarin kann nýta sínar førleikar og gerast so sjálvbjargin sum gjørligt. Eisini fara karmarnir at styðja undir, at borgarin kann liva eitt vanligt lív, har familja og vinfólk koma á vitjan, uttan at hetta skal órógva restina av teimum, ið viðkomandi býr saman við.

Nevndini er upplýst, at lógaruppskotið fer at hava við sær øktan rakstur.

Samlaða talið av tøkum bústøðum økist við hesum lógaruppskoti, men ilt er í løtuni at meta nágreiniliga um, hvussu nógv raksturin við hesum sambýli fer at økjast. Vegleiðandi ber til at upplýsa, at eitt pláss á sambýli til fólk við menningartarni kostar umleið 760 tús. kr. um árið, og eitt pláss í búfelagsskapi umleið 249 tús. kr. um árið. Leiguprísurin er ikki ásettur, men verður roknað við eini húsaleigu á 4.500 kr. pr. mðr., verður leiguinntøkan 972.000 kr. Nettoútreiðslan til rakstur av nýggja sambýlinum á Mýrini 4-6 verður mett til at verða 9.642.930 kr.

Nevndin er eisini enn einaferð kunnað um langan bíðilista og stóra tørvin á búplássum til menningartarnað í Tórshavn. Tí verður mett átrokandi at fáa útvegað fleiri bústaðir til menningartarnað, so skjótt sum tilber.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum, og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið

Fíggjarnevndin, 19. januar 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Kristina Háfoss
	Ruth Vang	